B36-KÍ:

# Nógv mál tá ið KÍ vitjar B36

**KÍ hevur ikki síðani 2000 vunnið í Gundadali móti B36, sum hesa ferð aftur fer at hava liðformannin í miðverjuni**

UPPTAKT

*Jóannes Hansen*

Týskvøldið var B36 venjarin, Sigfríður Clementsen, millum áskoðararnar, sum sóu KÍ tapa 2-0 á heimavølli móti Skála. B36 venjarin hevur neyvan mist svøvnin av tí, sum hann sá í Klaksvík.

B36 vann sunnudagin 2-0 í Fuglafirði, og tað tykist sum um, at teir eru á veg rætta vegin. Um metast skal út frá B36 avrikinum móti ÍF, og út frá KÍ avrikinum týskvøldið, so er sannlíkið ikki serliga stórt fyri poleraðum fótbóltsspæli, men heldur um stríð og nógvar nærdystir, tá ið KÍ sunnudagin fer at vitja B36. Men nú verður talan um nýggja uppgerð, og tað kann væl fara at vísa seg, at tað ikki bara verður spennandi og harvið undirhaldandi, men eisini gott fótbóltsspæl. Bæði B36 og KÍ eiga góðar fótbóltsspælarar.

Hagtølini siga, at tað er ógvuliga stórt sannlíki fyri, at áskoðararnir fara at vera vitni til fleiri mál í Gundadali. Seinasta ferðin, at tað endaði málleyst, tá ið B36 og KÍ hava spælt í høvuðsstaðnum, var í 1978.

Í fjør spældi B36 í 1. hálvleiki KÍ sundur og saman og var frammanfyri 2-0. Eftir steðgin snaraðist alt á høvdið. KÍ fekk takið, teir javnaðu til 2-2, og síðstu løtuna var um reppið, at teir fingu sigursmálið. Í fyrraárið vann B36 7-1, og í 2002 var úrslitið 3-3. So søgan bendir á, at tað fara at verða skorað mál í Gundadali sunnudagin.

Tá ið B36 sunnudagin var í Fuglafirði var liðformaðurin, Pól Thorsteinsson, ikki við. Tað verður roknað við, at hann aftur hesa ferð verður tøkur, og harvið fer Fróði Benjaminsen at verða fluttur longri fram á vøllin.

Í Klaksvík er Leon Bjartalíð tøkur aftur, eftir at hann hevur verið skaddur síðani KÍ var í Gøtu.



*Í fjør endaði tað við javnleiki, tá KÍ vitjaði hjá B36*

## Andrew skoraði tvey mál

**Føroyski álopsspælarin styrkti mánakvøldið um sína støðu í Fremad Amager, har hann seinastu ferðirnar ikki hevur verið millum teir fremstu**

ÚTISETI

*Jóannes Hansen*

Andrew av Fløtum styrkti mánakvøldið um sína støðu í Fremad Amager. Eftir at føroyski álopsspælarin fleiri tær fyrstu ferðirnar eftir vetrarsteðgin var millum teir fyrstu ellivu, hevur hann tær tær seinastu ferðirnar bara spælt síðstu løtuna.

At vandi hevur fyri, at dystarvenjingin skuldi minka, mundi mánakvøldið vera orsøk til, at Andrew var á U-21 liðnum hjá Fremad Amager, sum spældi á útivølli móti Holbæk. Og tað ber ikki til at siga annað, enn at Andrew tók av, og at hann harvið styrkti um sína støðu fyri í vikuskiftinum at vera millum teir fyrstu ellivu.

Fremad Amager vann 2-1, og Andrew av Fløtum skoraði bæði Fremad málini. Øll málini vórðu skorað í 1. hálvleiki. Andrew javnaði til 1-1 eftir horna og hálvbjarging, og hann skoraði sigursmálið beinleiðis upp á fríspark.

Í næstbestu deildini skal Fremad Amager sunnudagin spæla á heimavølli móti HIK.

NSÍ-ÍF:

## ÍF hevur takið á NSÍ

**Tað eru ellivu ár síðani, at NSÍ vann á heimavølli móti ÍF, sum í Runavík skal royna at reisa seg eftir vónbrotið móti B36**

UPPTAKT

*Jóannes Hansen*

ÍF hevur takið á NSÍ. Tað siga hagtølini, og í fjør var tað soleiðis, at tað fyrst og fremst vóru sigrarnir móti NSÍ, bæði á heimavølli og útivølli, sum vóru høvuðsorsøkin til, at ÍF slapp undan beinleiðis niðurflyting og síðani í endaspæli bjargaði sær rættin at halda fram í bestu deildini.

NSÍ hevur ikki vunnið á heimavølli móti fuglfirðingum síðani 1994, tá ið úrslitið var 3-1. ÍF hevur síðani tá verið fleiri ár í næstbestu deildini, og NSÍ hevur eisini okkurt árið verið millum teir næstbestu.

Hjá ÍF eru allir spælararnir tøkir. Sylla hevur havt trupulleikar við hælinum, men hann hevur vant í hesi vikuni, og alt bendir á, at hann verður í ÍF álopinum sunnudagin.

NSÍ hevur higartil í ár bara verið eina ferð á heimavølli, og tá gekk tað einki serligt. Hóast teir royndu at trýsta TB, so megnaðu teir ikki serliga væl at spæla seg til upplagdar málmøguleikar, og tað var ikki fyrrenn við síðsta sparkinum í dystinum, at teir javnaðu til 1-1.

Síðsta sunnudag megnaðu teir at skjóta tvey mál á Mølini. Fokus skal sunnudagin vera á tí samstundis sum tað skal byrgjast fyri Sylla, Gunnari Nielsen, Magna á Lakjuni og hinum ÍF spælarunum.

ÍF tapti fyrstu ferð sunnudagin. Harvið mistu teir oddasessin, og nú skulu spælararnir hjá Peturi Simonsen vísa, at teir eru førir fyri at reisa seg.

NSÍ hevur ikki vunnið síðani í fyrsta umfarinum, tá ið teir í Gundadali fingu fult móti B36.

TB-EB/Streymur:

# TB hevur ongantíð tapt

**Hóast EB/Streymur miðjar eftir heiðursmerkjum, og TB stríðist fyri at sleppa av aftasta plássinum, so er tað eisini ein partur av veruleikanum, at EB/Streymur enn ikki hevur vunnið á Sevmýri**

UPPTAKT

*Jóannes Hansen*

EB/Streymur miðjar høgt. Miðvallarin Jákup Martin Joensen, sum hevur verið liðformaður, men sum ikki hevur spælt higartil í ár, tí hann hevur verið skaðaplágaður, segði í leikskránni síðsta sunnudag, og hetta er endurgivið á heimasíðuni hjá teimum, at hann metir fólkagrundarlagið vera betri í ár, enn tað nakrantíð hevur verið tey árini, teir hava verið í bestu deildini. Við tí veruleikanum í huga heldur hann tað ikki vera órímuligt, at teir miðja eftir fyrstu heiðursmerkjunum.

Skulu teir í EB/Streymi røkka so høgt, so er eitt av tøkunum, at teir vinna á Sevmýri. Higartil hava TB og EB/Streymur bara tvær ferðir verið í bestu deildini í senn, og EB/Streymur eigur framvegis fyrsta sigurin á Tvøroyri til góða. Í 2002 var 1-1, og í 1994 vann TB 4-1.

Hjá EB/Streymi eru allir teir somu tøkir, sum vóru við í 2-2 uppgerðini á Mølini móti NSÍ.

TB er einasta felagið, sum higartil í hesum kappingarárinum ikki hevur vunnið. Sunnudagin taptu teir 3-1 í Gundadali móti meistarunum í HB, og tað vóru teir ikki so illa nøgdir við.

Í fýra teimum fyrstu umførunum hevur TB bara átt heimavøll móti B36. Takið hjá B36 er fyrst og fremst at sleppa av aftasta plássinum, og um tað skal eydnast, so verður neyðugt at fáa trý stig onkra ferðina. Ein av møguleikunum verður sunnudagin.

Hjá TB eru allir teir somu, sum sunnudagin spældu móti HB, tøkir móti EB/Streymi. Síðsta ferðin, at TB vann landskappingardyst á heimavølli í bestu deildini, var í fyrsta umfarinum í 2002. Tá var úrslitið 1-0 móti VB. Hetta var 5. mai í 2002. TB vann ongan annan dystin í 2002, og í fjør og í fyrraárið vóru teir í næstbestu deildini.